# Foreldrini eru vegurin til eitt

10 børn við vekttrupulleikum hava seinasta mánaðin verið á summarskeiði á Skarvanesi saman við foreldrum og serfrøðingum. Har hava tey lært, hvussu tey kunnu fáa eitt lættari og sunnari lív, og tey eru lætnað tilsamans 40 kilo



Hvønn dag er rørsla av alskyns slag á skránni. Henda seinnapartin renna øll og aftan á fara øll at svimja í Meginskúlanum

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@Sosialurin.fo*
*myndir: Rigmor Dam*

**Skarvanes:** Tokan liggur tjúkk undir smala bygdavegnum. Tíbetur fjalir hon djúpið, ið hómast hinumegin slitnu autoverjurnar, sum eru einasta markið millum silvurlitta leigubilin og avgrundina. Og í fimm nervøsir kilometrar er morgunlesturin á millumbylgju einasta sambandið við umheimin. Men við eitt trínur bygdin fram úr tokuni, og yvir kulørtu húsunum og grønasta juligrasinum er himmalin høgur, og eg gestur.

Fríggjadagur er, og bert tveir dagar eru eftir av summarskeiðinum fyri børn, sum viga ov nógv. Í fýra vikur hava tey nærum livað eina Robinson-tilveru, avbyrgd frá umheiminum í fjarskotnu bygdini Skarvanesi vestantil á Sandoynni. 10 børn úr øllum landinum, við hvør sínum foreldri og trimum starvsfólkum.

*Tað er troyttandi altíð at vera aftast, og ikki at renna so skjótt og ikki at passa klæðini.*
*Hans Hjørleivur, 11 ár*

– Tá eg var valdur í nevndina fyri Jólamerkjagrunnin, skeyt eg upp, at vit gjørdu eitt tilboð fyri børn við vekttrupulleikum, sigur Fróði Joensen, barnalækni á Landssjúkrahúsinum, tá hann hevur boðið mær upp um rúgvuna av súkklum í túninum og inn í køkin í øðrum av teimum báðum gulu húsunum, sum hava hýst skeiðinum seinasta mánaðin.

– Tað var av tilvild, at tað bleiv Skarvanes, tí Ingi Mohr, sum eigur húsini, beyð okkum tey ókeypis. Og tá vit ikki hava nakra stóra fíggjarætlan, valdu vit sjálvsagt at taka av, sigur Fróði. Og hann greiðir frá, at trý starvsfólk hava verið í bygdini alla tíðina, meðan hann sjálvur hevur verið til arbeiðis í Havn. So lutur hansara hevur verið at kanna børnini undan uppihaldinum og at siga gott fyri heilsu teirra annars.

Tær tríggjar, sum annars hava staðið fyri skeiðinum eru Anna Louisa Joensen, sjúkrasystir, Helle Drews, barnafysioterapeutur og Ulla Sidsel Brandi, kostráðgevi.

– Vit settu eina lýsing í bløðini, har vit buðu summarskeiðið til børn og foreldur, sum eru motiverað til at gera nakað við vekttrupulleikan, tí tað er avgerandi, at tey sjálvi ásanna, at tey viga ov nógv, sigur Fróði Joensen. Inn komu 43 umsóknir, sum luku treytirnar, men pláss var bara fyri 10 børnum.



Tær tríggjar, sum hava staðið fyri skeiðinum eru Anna Louisa Joensen, sjúkrasystir, Helle Drews, barnafysioterapeutur og Ulla Sidsel Brandi, kostráðgevi



Fróði Joensen, barnalækni, tók stig til summarskeiðið

*Eg gráti ikki, men kann blíva óður við meg sjálvan, tí eg dugi ikki so væl at steðga við at eta, og so eti eg alt ov skjótt.*
*Hans Hjørleivur, 11 ár*

### Ikki kurur, men lívsstílur

Endamálið við tiltakinum er, at børnini sleppa at vera á Skarvanesi í fýra vikur saman við einum av foreldrum sínum, og at tey síðani læra at eta sunnari og lættari, umframt at røra seg meira.

– Vit bjóða ein gerandisdag, har kostur og rørsla eru í hásæti, alla tíðina við foreldrunum sum næsti stuðul barnsins, sigur Fróði Joensen, sum samstundis sigur seg vóna, at børnini tapa umleið eitt kilo um vikuna, meðan skeiðið er.

– Men málið er ikki, at børnini bara skulu tapa seg her, tí talan er ikki um ein kur, men um eina broyting av lívs- og kostvanum, sum eigur at halda fram, tá tey koma heim. So hóast tey hava tapt seg í her, er enn ov tíðliga at siga nakað um, hvussu skeiðið hevur eydnast, tí tað fer tíðin at vísa, sigur Fróði Joensen.

*Eg verið ikki argaður her í Føroyum, men tað varð eg, tá vit búðu í Danmark. Eg hati at berjast og eri vanliga ein friðarligur drongur. Men tá onkur argaði meg, so bleiv eg óður, og tey fingu tað aftur.*
*Hans Hjørleivur, 11 ár*

### Fjølbroyttir aktivitetir

Á skeiðinum fáa børnini ymisk tilboð og avbjóðingar, so sum at ríða, svimja, ganga túrar, renna, súkkla og at rógva. Dagurin er lagdur soleiðis til rættis, at aftaná morgunmatin eru aktivitetir, og um middagsleitið fáa tey breyð við soltnum viðskera, har hvørt barnið fær skamtaðar nøgdir at eta. Seinnapartin eru aftur tilboð og felags aktivitetir, og um náttúrðatíð verður borðreitt við heitum mati, sum foreldrini skiftast um at gera, undir kønari vegleiðing frá kostráðgeva. Á kvøldið eru upplegg og prát fyri foreldrunum, meðan børnini spæla frítt.

– Tað hevur alstóran týdning, at ongin er svangur. Tí hava børnini alla tíðina atgongd til frukt og grønt, sum tey kunnu fáa sær.

*Nú havi eg lært at rógva, og tað dámar mær ordiliga væl. Eg havi ikki fingið árabløðrur, men tað hevur babba.*
*Hans Hjørleivur, 11 ár*

### Foreldrini eru lykilin

Munurin á tilboðnum í Skarvanesi og øðrum líknandi tilboðum, sum vit kenna eitt nú frá teimum donsku jólamerkjaheimunum, er, at her eru foreldrini vegurin til eitt lættari og sunnari lív, meðan donsku børnini eru einsamøll á jólamerkjaheimi í tríggjar mánaðir.

– Tað eru foreldrini, sum geva børnum at eta, tey seta mørkini og hava ábyrgdina fyri børnunum. Tað nyttar einki at fortelja børnum um øðrvísi kostvanar og nýggjan lívsstíl, um tey koma heim aftur til gomlu